Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Eirargarður

Spurningar:

1. Nær verður farið undir at umvæla/dagføra Eirargarð 16?
2. Hvat fevnir arbeiðið um?
3. Nær verður arbeiðið væntandi liðugt?

Viðmerkingar:

Bygningarnir Eirargarður 14 og 16 vórðu bygdir í 1970'unum og eru í ringum standi og ótíðarhóskandi í dag. Ætlanin hevur verið at gera ymsar ábøtur og dagføringar á Eirargarði 14 og 16, meðan bíðað varð eftir nýggja heiminum í Reynstúni. Við lógaruppskoti frá mars 2020 vórðu 30 milliónir settar av til at dagføra fleiri vardar bústaðir. Eirargarður er ein av hesum. Nú byggingin av heiminum í Reynstúni enn ikki er byrjað, hevur tað stóran týdning fyri búfólk, starvsfólk og avvarðandi, at arbeiðið á Eirargarði verður framt.

Fyri at frætta, hvussu langt ætlanin at dagføra og umvæla er komin, verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi 1. desember 2021

Eyðgunn Samuelsen